✝

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum
at okkara kæri pápi, verpápi og abbi

**Petur Eli Mikkelsen**
fyrrv. 1. lærari í Gøtu

andaðist hósmorgunin 18. apríl.

Jarðarferðin verður úr Gøtu kirkju
mánadagin 22. apríl kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Elin, Petur Páll, Jóannes og Barbara**

✝

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum
at okkara kæri

**John Dam**
skipari, ættaður úr Vestmanna

andaðist í heiminum í Hoyvík
17. apríl 2002, 70 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr heiminum
sunnudagin 21. apríl kl. 13.00 í Vesturkirkjuna.

*Fyri tey avvarðandi*
**Oddvør, Hans Andreas, Marita,
Zacharias og abbabørn**

# Føroyskir dagar á Torginum í SMS

Hesa og komandi viku verður Torgið í SMS aftur karmur um føroyskir dagar. Tá fara føroyskar fyritøkur, sum framleiða og selja vørur, tænastur og annað, at sýna fram tað, tær hava at bjóða.

Tiltakið kann sigast at vera afturvendandi, tí longu í 1978 var fyrsta føroyska vikan – sum tað nevndist tá – á Torginum. Men vánaligu tíðirnir í áttatiárunum høvdu við sær, at tiltakið datt niðurfyri. Virksemið hjá føroysku fyritøkunum minkaði, samstundis sum virksemið á Torginum í SMS eisini minkaði. Fyritøkur lótu aftur, meðan aðrar – summar betur enn aðrar – megnaðu at halda høvdið yvir vatnskorpuni; til tíðirnar aftur broyttust til tað betra fyri – nú longu – fleiri árum síðani.

Aftaná ein steðg í nøkur ár tók SMS í fjør stig til aftur at leggja seg eftir at fáa føroyskar vørur og framleiðslu undan kavi og fram í ljósið. Í fjør vóru fyritøkurnar, sum sýndu fram, serliga tær, ið framleiða vanligar gerandisvørur, sum vóru til keyps í húsinum. Í ár er eitt sindur øðrvísi.

Aftur at teimum fyritøkum, ið framleiða vanligar gerandisvørur, hevur SMS fingið fleiri føroyskar fyritøkur, sum framleiða aðrar vørur og bjóða fram tænastur av ymiskum slagi, við í framsýningina.

Rógvi Róin, marknaðarleiðari í SMS, sigur, at hetta er gleðiligt, og tað er eingin loyna, at hetta var okkara mál, tá vit seinasta ár tóku stig til aftur at skipa fyri teimum áður sera vælumtóktu føroysku temavikunum í SMS.

Vit vóna, at undirtøkan í ár fer at hava við sær, at vit framhaldandi kunnu skipa fyri hesum tiltaki og kanska enntá fáa enn fleiri luttakarar við komandi ár. Livst so spyrst!

Fyritøkurnar, sum sýna fram hesa vikuna eru: Føroya Bjór, Føroya Banki, MBM, Kemilux, Føroya Gluggi og Fóm.

Í meðan føroysku dagarnir eru á Torginum í SMS verður eisini undirhald. Fríggja- og leygardagin vitja Fjotto og Bobo á básinum hjá Føroya Bjór, meðna Janus Kampmann og Vagnur Streymoy spæla føroyskan tónleika fríggjadagin kl. 17.00 á Torginum.

Annars fæst meir at vita um tiltakið á heimasíðuni hjá SMS – www.sms.fo. Og har ber eisini til at luttaka í stóru spurnarkappingini, har høvuðsvinningarnir eru ein ferð til Reykjavíkar fyri tvey frá Atlantsflog, ein Nokia 3330 fartelefon við teletíðarhaldi frá Føroya Tele og eitt gávukort á 1.000,00 frá SMS.

## Nýggjur søluleiðari hjá Eimskip í Føroyum

1. apríl byrjaði Joel undir Leitinum sum søluleiðari hjá P/F Eimskip í Føroyum. Joel undir Leitinum er 30 ára gamal, og hann hevur lokið prógv sum cand. merc. í fígging og roknskapi við Handilsháskúlan í Keypmannahavn í 1998.

Síðani hann var liðugur við lesturin, hevur hann starvast hjá oljufelagnum Lasmo í London í eitt hálvt ár og sum sølu- og framleiðslumaður á Føroya Fiskasølu í trý ár.




Er tað tær vit leita eftir?

Vinnumálastýrið søknast eftir einum fólki til journalleiðarastarvið í stýrinum. Starvið verður sett undir Aðalskrivstovuni. Umframt aðalskrivstovuna fevnir Vinnumálastýrið um 3 deildir fyri ávikavist vinnu-, samskiftis- og veterinermál, og hevur stýrið sum høvuðsuppgávu at standa fyri at umsita vinnu-, samskiftis- og veterinermál hjá landsstýrinum. Vinnumálastýrið umsitur málsøki í m.a. ídnaði, handli, landbúnaði, aling, mati og umhvørvi, arbeiðsmarknaði, samskifti, samferðslu, herímillum fyrireiking og eftirlit við løgum, kunngerðum og reglugerðum.

**Tín førleiki:**
- skrivstovuútbúgving ella líknandi
- dugir væl føroyskt og danskt umframt kunnleika til enskt
- kunnleika til EDV á brúkarastigi
- góð samstarvsevni

**Tínar uppgávur:**
- at journalisera og avgreiða post
- ymiskar skrivarauppgávur fyri fulltrúar, deildarstjórar og aðalstjóra
- aðrar skrivstovuuppgávur

**Vit bjóða tær:**
- eitt spennandi og lærurikt starv, sum tú sjálv/ur ert uppi í at skapa, viðhvørt strævið, men samstundis sera áhugavert og avbjóðandi við góðum skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikum.

**Løn- og setanartreytir**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið fevnir um Vinnumálastýrið og stovnar undir tí umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

**Umsóknir**
Hevur hetta tín áhuga, er tú vælkomin at senda eina umsókn við prógvum, viðmælum o.o. til:

**Vinnumálastýrið**
**Postboks 377**
**Tórshavn**

innan 1. mai 2002.

Upplýsingar um starvið fært tú frá Ara Johanneson, deildarstjóra í Vinnumálastýrinum, á tel 35 60 60.

VINNUMÁLASTÝRIÐ





Longt barsilsfarloyvi

Børnini eru tað dýrabærasta, vit eiga. Tey eru størsta tilfeingið, sum samfelagið hevur, men tað er ikki altíð, at samfelagið gevur teimum nóg stóran ans.

Foreldur ynskja at vera so nógv um sítt nýfødda barn, sum til ber. Fingu tey umstøður og fíggjarliga orku at vera heima í longri tíð, hevði tað samstundis lætt um trýstið á barnaansing.

Sambandsflokkurin vil tryggja foreldrum at nýføddum børnum, at tey sleppa aftur í sítt starv, um tey velja at vera heima hjá pinkubarninum. Málið er, at farloyvi kann vera givið í 52 vikur.

Barnaansing er framvegis ein ring samvitska í Føroyum. Samfelagið krevur, at bæði foreldrini eru á arbeiðsmarknaðinum og skapa virði til sín sjálvs og felagsskapin. Tað krevur, at barnaansing er til øll.

Sambandsflokkurin vil virka fyri, at kommunurnar fáa betri møguleikar at nøkta tørvin á ansingarplássum. Tað verður gjørt við, at fløguloftið hjá kommununum á hesum øki skal hækkast.

Við Sambandsflokkinum eru børnini í tryggum hondum.

Sambandsflokkurin
- gott samstarv

B